gult cyan magenta svart



# N‡ggj samfer›sluhavn í Su›uroy

*Landst‡ri› gó›kennir nú, at Tvøroyrar Kommuna leggur hald á samfer›sluhavnina á Drelnesi og ta› er gle›iligt, sigur Dan Nielsen, b‡rá›sforma›ur*

ÁKI BERTHOLDSEN

Ta› kundi ikki anna› enn elva til kjak, tá i› vit í Sosialinum í farnu viku kundu grei›a lesarum bla›sins frá 10 ára verklagsætlanini, sum Karsten Hansen, landsst‡risma›ur í fíggjarmálum, nú er í fer› vi› at gera uppskot um.

Eisini í Su›uroy fegnast tey sjálvandi um tær útbyggingar, sum ætlanin er at fremja har í oynni.

Hugsa› ver›ur m.a. um tunnilin ímillum Øravík og Hov, n‡ggjan Smyril og studentaskúlan.

Men ta› er serliga ein partur av hesi n‡ggju verklagsætlanini, sum hevur vakt ans su›uri á Tvøroyri.

Og ta› er ætlanin at seta pening av til eina n‡ggja samfer›sluhavn í Su›uroynni

– Hetta eru sera gle›ilig tí›indi fyri okkum sigur Dan Nielsen, b‡rá›sforma›ur á Tvøroyri.

B‡rá›sforma›urin sigur, at tá i› landsst‡ri› setir pening av til eina n‡ggja samfer›sluhavn í Su›uroy, kann ta› ikki merkja anna› enn at landsst‡ri› samstundis gó›kennir, at Tvøroyrar Kommuna tekur samfer›sluhavnina, sum er á Drelnesi til onnur endamál.

Ta›, sum hann sipar til, er, at Tvøroyrar B‡rá› hevur nú í fleiri ár virka› fyri at oljuhavn ver›ur løgd á Tvøroyri.

Í tí sambandinum hevur kommunan ætla› at tiki› samfer›sluhavnina á Drelnesi til endamáli›.

Dan Nielsen sigur, at b‡rá›i› hevur langt sí›ani gjørt landsst‡rinum geitt, at ta› metti havnina á Drelnesi sum kommununar ogn.

– Og nú hevur so landsst‡ri› endaliga gó›kent hesa ætlanina vi› at seta pening av á verklagsætlanini til eina n‡ggja samfer›sluhavn í Su›uroy, sigur Dan Nielsen.

Ta› er ikki greitt, hvar tann n‡ggja samfer›sluhavnin í Su›uroy skal vera.

Men trúligast er, at hon ver›ur beint eystanfyri ferjuleguna sum nú er, og at gróti›, sum ver›ur tiki› úr tunlinum, sum skal gerast ímillum Øravík og Hov, ver›ur brúkt til grótkast og ífyllu.

Men Dan Nielsen sigur í øllum førum, at eftir hansara tykki er ein samfer›sluhavn í Su›uroy ein landsuppgáva burturav og at Tvøroyrar Kommuna fer ikki at betala ein part av henni, um hon ver›ur gjørd har í kommununi.



*Fyrireikingarnar halda fram at gera oljuhavn á Drelnesi*

## Leggja vatni›

Annars halda fyrireikingarnar at gera oljuhavn á Drelnesi, fram.

Ein t‡›andi partur av eini oljuhavn er atgongdin til reint vatn. Og Tvøroyrar B‡rá› hevur nú samtykt at leggja vatnveiting yvir á Drelnes.

Ein oljuhavn krevur, at ta› ber til hjá skipum at bunkra 80-90 tons av reinum vatni um tíman og tey krøvini l‡kur n‡ggja vatnveitingin.

B‡rá›sforma›urin sigur, at arbei›i› at leggja vatnveitingina ver›ur bo›i› út í heyst.



# Stevna í Gøtu

Í Gøtu er bygdin stevnuskr‡dd til komandi vikuskifti›, tí nú ver›ur stevna vi› nógvum spennandi tiltøkum.

Byrja› ver›ur fríggjakvøldi› vi› fólkavísukvøldi í Losjuni. Ta› er Grót, sum stendur fyri hesum.

Tey, i› luttaka eru: Hanus G. Johansen, Jógvan Andreas Joensen, Niels Midjord og Sámal Ravnsfjall & Ronnie Nielsen. Hetta tiltaki› byrjar kl. 20.

Leygardagin ver›ur byrja› klokkan 10 vi› fótbóltskapping fyri tey yngru. Tey spæla til umlei› kl. 14.

Klokkan 14.30 ver›ur stevnan sett av bygdará›sformanninum, Jógvan Gregersen, og Felagskóri› Gøta/Leirvík syngur. Aftaná ver›a skemtidystir millum flakakvinnur úr Gøtu, Leirvík, Runavík og av Toftum. Vinnandi li›i› fær steyp til ognar.

Kl. 17 er tiltak á kaiini vi› skemti á sjónum, og kl. 18 er køkutombola á tivoli økinum.

Fótbóltur millum ÍF 79 og GÍ 79 ver›ur kl. 19.

Í Glyvrahanusarhúsi› er listaframs‡ning vi› nógvum n‡ggjum spennandi nøvnum har ímillum Ei›vør Pállsdóttir, hesum tiltaki skipar Grót fyri.

Kl. 23 syngur Ei›vør Pállsdóttir á tivoliøkinum, og Frits Johannesen flytur fram rø›u.

Bál ver›ur tendra›, og kl. 24 ver›ur ta› stóra f‡rverki› sent. Dansur ver›ur á Kambsdali vi› Ey›uni og Terja.

Eisini ver›a útimøti bæ›i leygarkvøldi› og sunnukvøldi›.

Tivoli er opi› allar dagarnar.

Sunnudagin ver›ur stevnudystur millum 2. deild hjá GÍ og LÍF, og skemtidystir millum børn og foreldur.

Kl. 16 sunnudagin ver›ur bingo í Høllini á Kambsdali.

# Grind í Húsavík

ELI HENTZE

Um náttúratí› t‡skvøldi› var bo›a› frá, at grind var› funnin. Skálvíkingar høvdu bori› eyga vi› grind, i› lá og ama›i seg upp at brimgar›inum. Grindin bleiv rikin inn á vágna í Húsavík, har hon leg›i beinini um hálvgum tíggju tí›ina. Drápi› tók ikki meira enn gó›ar tíggju minuttir. Grind in var ikki stór, einir 38 hvalir.

Hetta nógva práti› um grindadráp og Poul Watson hesa seinastu tí›ina hevur helst gjørt sítt til, at fólkini vóru so nógv í tali, i› eygleiddu raksturin og sjálvt drápi›. Men Shepardma›urin var› av gó›um grundum ongasta›ni at síggja.

Húsavíkingar og sandoyingar annars hava vi› grinddrápinum t‡skvøldi› tjó›starta› Sandoyarstevnuna, i› ver›ur í vikuskiftinum. Um húsavíkingar fara at bjó›a gestunum grind er helst ivasamt, men at nógv anna› bæ›i til álvara og gamans fer at ver›a bjó›a› er onki at ivast í.



gult cyan magenta svart





*Týska herskipið, Greif, á Havnini í 1938. Hann sæst her liggja við bryggju undir Skipafelagnum. Í baksýni sæst m. a. Sjóvinnubankin í Gongini. Sum tað sæst á myndini hevði hetta skipið flúgvara umborð. Heðin Mortensen eigur myndina*

# Havnin undir krígnum

*Árliga framsýningin hjá B36 um ólavsøkumundið í SMS sýnir hesaferð Havnina undir krígnum. Við myndum, lutum og sjónbandi verður hetta serliga tíðarskeiðið lýst*

EIRIKUR LINDENSKOV

Í gjár klokkan 14 lat upp forvitnislig myndaframsýning í SMS í Havn.

Tað er Birgar Johannesen vegna fótbóltsfelagið B36, ið hevur lagt framsýningina til rættis - á sama hátt sum hann hevur gjørt tey undanfarnu árini, har myndaevnini tó hava verið øðrvísi.

– Hesaferð hava vit valt at lýsa Havnina undir krígnum. Hetta hevur kortini ikki verið so lætt, sum tá vit í fjør lýstu fólk í Havn í sekstiárunum, sigur Birgar Johannesen. Hann sigur, at tey, sum vóru ung í fýratiárunum, eru eitt sindur meira innilukkað - og er í summum førum meira treyðug at lata honum myndir.

– Vit kundu sjálvandi hugsað okkum at víst onkra mynd av ungum føroyskum gentum og bretskum hermonnum. Men slíkar myndir vildu fólk ikki av við, helst fyri ikki at koma onkrum illa fyri, sum nú kanska er farin aðrar leiðir, sigur Birgar Johannesen.

Birgar Johannesen vísir á, at Havnin var so lítil undir krígnum.

– Havnin var fyri so vítt millum Tinganes og Sjónleikarhúsið. Tað var har, alt gekk fyri seg - og tað eru rættuliga nógvar myndir at finna hjá fólki, sigur hann.

Birgar Johannesen sigur, at hann hevur fingið nógvar myndir, sum eru rættuliga áhugaverdar - og sum ikki hava verið at sæð í ymsu bókunum, sum eru skrivaðar um hesa tíðina.

– Eitt nú havi eg fingið eina mynd av einum týskum destroyara, sum var á Havnini í 1938 - beint fyri krígg-ið. Hann hevði ein flúgvara standandi á dekkinum. Tað er rættuliga áhugavert at hugsa sær, hvørji ørindi ein týskur destroyari hevði í Føroyum tá, heldur Birgar Johannesen.

Umframt mongu myndirnar verða eisini sýnd fram gomul útvarpstól frá krígnum, har eisini tónleikur frá krígnum er at hoyra. Eisini hava teir fingið fatur á hermannabúnum - frá Lowat Scouts og Cameroon, ið hermenninir nýttu í Føroyum undir krígnum. Afturat hesum verður sjónband við livandi myndum eisini víst. Tilsamans ein tíma av livandi myndum hava fyrireikararnir sett saman, og greiða Jógvan Arge o. a. frá tí, ið fer fram á filminum.

– Sjálvur haldi eg framsýningina vera sera forvitnisliga - men serliga forkunnugt mátti tað verið hjá fólki, ið minnast hesa tíðina, og hjá fólki, ið hava hug at síggja, hvussu hendan tíðin í Havnini kann lýsast á hendan hátt, sigur Birgar Johannesen.



*Ein dukka í bretskum herbúna er ein av lutunum á framsýningini hjá B36 á Torginum í SMS. Norman Egholm, húsavørður er í ferð við at leggja síðstu hond á framsýningina*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Bygdarstevnan í Sumba ár 2000



***Tórsdagin 20. juli***

| | |
|---|---|
| Kl. 19.00 | Gott stevnubingo verður í Samkomuhúsinum |

***Fríggjadagin 21. juli***

| | |
|---|---|
| Kl. 18.00 | Sumba–TB piltar, fótbóltur |
| Kl. 19.00 | Sumba/VB–Royn/TB old boys |
| Kl. 20.00–23.00 | Barnadansur í dansistovuni |

***Leygardagin 22. juli***

| | |
|---|---|
| Kl. 12.30 | Skrúðgonga frá fótbóltsvøllinum og oman í Billhústún |
| Kl. 13.00 | Stevnan verður sett í Billhústúni av Henning Thomsen |
| Kl. 14.00 | Sumba–TB menn, fótbóltur |
| Kl. 15.45 | Sumba–VB gentur 10-12 ár, fótbóltur |
| Kl. 16.00 | Tivoli letur upp. Bamsutombola, eydnuhjól og bóltkast í Skúlagarðinum |
| Kl. 16.00–20.00 | Framsýning letur upp í skúlanum. Heri Andreasen sýnir fram lutir og film av jólaskipinum. Málningaframsýning við Palle Julsgård, Nimrod Midjord, Beintu Poulsen og Gunnvá Poulsen. Træskurðir við Henning Thomsen. Ruth Magnussen sýnir slípaðar steinar. Torgerð Suðuroy sýnir ymiskar silvurlutir. Alma Andersen sýnir fram grønlendska perluseyming. Á framsýningini er møguleiki at keypa ymiskar lutir |
| Kl. 16.00–20.00 | Kaffi, vaflur og pannukøkur eru til sølu í Skúlanum |
| Kl. 20.00–23.00 | Barnadansur í dansistovuni |
| Kl. 24.00 | Midnáttarsamkoma. Arnfinn Bjarkhamar førir fram røðu |
| Kl. 24.00 | Dansur í Samkomuhúsinum. Ein blanding spælir |

***Sunnudagin 23. juli***

| | |
|---|---|
| Kl. 14.00 | Sumba–Royn smádreingir, fótbóltur |
| Kl. 14.45 | Sumba–VB pinkur, fótbóltur |
| Kl. 15.15 | Flogbóltskapping millum bindiklubbar í Sumba |
| Kl. 16.00 | Brotssparkskapping fyri børn og plettskotkapping fyri vaksin |
| Kl. 16.00 | Tivoli letur upp. Bamsutombola, eydnuhjól og bóltkast í skúlagarðinum |
| Kl. 17.00–20.00 | Framsýningin í Skúlanum letur upp og samstundis letur kaffisølan upp í Skúlanum |
| Kl. 19.00 | Útimøti |

**Stuðlað hava: Suðuroyar Sparikassi, Føroya Sparikassi og Eysturoyar Heilsøla.**

**Sumbiar Ítróttarfelag**